# Børn og ung – okkara felags ábyrgd

Barna- og ungdómspolitikkur í Eysturkommunu



## Kósin

Eysturkommuna vil virka fyri, at øll børn og ung í kommununi skulu hava eitt gott barna- og ungdómslív.

Hetta vil Eysturkommuna tryggja við at skapa eitt gott støði undir trivnaði, heilsu, menning og læring hjá børnum og ungum í kommununi.

Við sínum *savnandi* eyðkenni vil kommunan heiðra ymiskleikan og skapa karmar fyri, at øll børn og ung verða stuðlað at brúka síni evni. Teirra egni samleiki verður styrktur við at tey ogna sær lokalu mentanina, søguna og siðaarvin, samstundis sum tey eru opin fyri ymiskleikanum.

Kommunan vil við sínum *framsøkna hugburði* stuðla áhugadrivnum felagsskapum, skapa karmar til hesar at virka undir og góðar umstøður at skipa sítt arbeiði.

Kommunan vil við *opinleika og vinalagi* tryggja børnum og ungum at tey verða sædd, hoyrd og vird.

Foreldrini hava høvuðsábyrgdina og besta kunnleikan um teirra barn, og tí er umráðandi við góðum foreldrasamstarvi.

Eysturkommuna vil ganga undan á barna- og ungdómsøkinum, og vil velja nýggjar og djarvar loysnir.

## Læring og menning

Eitt trygt barna- og ungdómslív er ein fyritreyt fyri læring og menning. Øll børn eru serstøk og eiga at fáa møguleika at stimbra síni íbornu evni og førleikar. Børn og ung læra og mennast í samspæli við onnur, og ein týðandi partur av hesum er, at tey kenna seg sum part av felagsskapinum og trívast.

Eysturkommuna eigur at tryggja børnum og ungum tilboð, ið eru tillagað barnsins aldur og menningarstøði.

### Starvsfólkaførleikar

Kommunan tryggjar at vaksin, ið eru um børnini í skipaðum tilboðum, hava hóskandi førleikar og dagførda vitan.
Hetta viðførir, at børn og ung fáa eina góða barlast at taka við avbjóðingum seinni í lívinum.

### Kvøldskúli

Eysturkommuna stuðlar undir, at Kvøldskúlin bjóðar út lærugreinar og ítrív, sum børn og ung ikki fáa í øðrum skipaðum tilboðum. Endamálið er, at fleiri børn fáa møguleika fyri at fáa kunnleika í og arbeiða við evnum, ið tey hava áhuga fyri.



## Læring og menning

### Ung í arbeiði

Eysturkommuna skipar fyri, at ung í 9. og 10. flokki fáa í boði lønt arbeiði í summarfrítíðini. Í arbeiðshøpi mennast og læra tey at samskifta og samstarva við onnur fólk, umframt at tey fáa arbeiðsroyndir, sum eru til gagns fyri tey seinni í lívinum. Kommunan eggjar vinnuni at skapa ungum møguleikar at nema sær arbeiðsroyndir.

### Lektiucafé

Eysturkommuna vil skapa møguleikar fyri, at børn, ung og foreldur eftir skúlatíð kunnu fáa ráðgeving og hjálp í sambandi við heimaarbeiði.

### Ungdómsráð

Skipast skal ungdómsráð, har børn og ung hava møguleika at greiða býráðnum frá og siga sína hugsan. Ráðið er ein hugskotsbanki, har børn og ung viðgera viðkomandi mál í samfelagnum.

Ungdómsráðið hevur fund við býráðið minst einaferð árliga.



**Frítíðarvirksemi**
Tað hevur týdning fyri trivnaðin hjá børnum og ungum at hoyra til og vera partur av einum felagsskapi.
Kommunan leggur seg eftir at stuðla einum fjøltáttaðum frítíðarlívi.

Áhugadrivið frítíðarvirksemi
Sjálvboðin átøk og hugskot hava stór virði fyri felagsskapin og tann einstaka. Kommunan vil stuðla og skapa karmar og rúmd fyri, at áhugadrivnir felagsskapir skulu spíra og mennast í einum stimbrandi umhvørvi.

Kreativitetur og spæl
Eysturkommuna vil skapa karmar fyri, at børn og ung skulu hava møguleika at savnast í skipaðum og tryggum umhvørvi, har møguleiki er at menna kreativu evnini til spæl, samveru og læring.

Skipað dagtilboð
Í Eysturkommunu verður miðað ímóti, at skipaðir karmar um børn og ung støðugt verða tillagaðir.





# Heilsa og trivnaður

Heilsa og trivnaður hjá børnum og ungum er felags ábyrgd hjá foreldrum, stovnum og kommununi.

Allir stovnar í kommununi skulu kunna um sunnan lívsshátt so sum svøvn, heilsugóðan kost og rørslu.

Kommunan skal tryggja tilboð um skjóta tvørfakliga ráðgeving til børn, ung og foreldur, tá tørvur er á tí. Endamálið við tilboðnum er, at hóskandi tiltøk kunnu setast í verk til tess at tryggja menning og trivnað hjá barninum.

## Heilsa og trivnaður

Starvsfólk hjá kommununi, sum arbeiða millum børn og ung, mugu fylgja væl við trivnaðinum hjá børnum og ungum.

Fakfólk nýta amboð at varnast tekin um vantandi trivnað so tíðliga sum gjørligt. Hetta er partur av fyribyrgjandi arbeiðinum við trivnaði barnanna. Fakfólk á stovnum í kommununi skulu beinanvegin og á rætta stað gera vart við og taka hond um avbjóðingar hjá børnum. Samstarv við foreldrini er ein fyritreyt fyri at skilja møgulig tekin um, at barnið ikki trívist nóg væl, og tá fyriskipanir skulu setast í verk.

Kommunan vil arbeiða fyri, at børn og ung undir 18 ár hava møguleika fyri at ferðast í royk- og rúsfríum umhvørvi.

## Umhvørvi

Børn og ung í kommununi skulu læra at fara væl um umhvørvið. Skipa verður fyri tiltøkum á umhvørvisøkinum, sum børn og ung fáa høvi at lutttaka í.



## Útilív

Rørsla styrkir sjálvsvirði og trivnaðin hjá børnum og hevur stóra ávirkan á læru. Tá børn røra seg, eru tey betri før fyri at hugsavna seg.
Børn við góðum sjálvsvirði megna viðgang og mótgang betri, og hetta økir um lívsgóðskuna og trivnaðin.

## Spælipláss

Eysturkommuna strembar eftir, at spælipláss eru í øllum bygdum, og at tey eru væl hildin og dagførd. Kommunan skal nýta náttúruna sum ein sjálvsagdan part av hesum plássum. Hetta vil stimbra bæði hugburð og virðing hjá børnum og ungum fyri okkara náttúrugivna tilfeingi.

## Fríøki

Kommunan vil varðveita og skipa fríøki, har allir borgarar kenna seg væl, og har ung og vaksin hava møguleikar til ymisk spøl og tiltøk.
Týðandi er, at fríøkini eru trygg og væl frágingin.



## Farleiðir og atkoma

Kommunan miðar ímóti, at allir borgarar kunnu ferðast trygt á væl skipaðum farleiðum bæði á gøtum, vegum og har koyrt verður við bussi.

Allir borgarar, eisini tey við serligum avbjóðingum, skulu hava góðar atkomu-møguleikar til frítíðarlív.

Børn og ung skulu hava møguleika at ferðast trygt til ymisk tiltøk bæði í kommununi eins væl og uttanfyri.
Kommunan arbeiðir fyri at knýta teir ymsu býlingarnir væl saman.

Busssambandið eigur støðugt at verða eftirmett og tillagað eftir tørvi. Kommunan ynskir at samstarva um ferðasamband við grannakommunurnar.



**Mentan**

Kommunan skal stuðla mentanarliga og listarliga økinum, so børn og ung hava góðar treytir og karmar at virka undir og menna síni kreativu evni.

Skipað kommunal frítíðartilboð

Í Eysturkommunu skulu skipað frítíðartilboð so sum kvøldskúli, tónlistaskúli, bókasavn o.a. støðugt mennast eftir tørvi,og hetta skal gerast í tøttum samstarvi við avvarðandi partar.

Kommunan skal gera sítt til, at tilflytarar fáa kunnleika til føroyska málið,
mentanina og siðaarvin soleiðis, at tey kunnu gerast partur av lokalsamfelagnum.







**Foreldrasamstarv**
Sum umsorgannarpersónar, fyrimyndir og røddin hjá børnunum eru foreldur mest týðandi og avgerandi persónar fyri, at børn og ung mennast til sjálvstøðugar borgarar.

Tí er gott foreldrasamstarv ein hornasteinur í arbeiðinum við børnum og ungum.

Foreldrini hava stóra vitan um síni børn og eru tí ein nátúrligur og sjálvsagdur samstarvsfelagi í arbeiðinum hjá fakfólki at gera eitt dygdargott arbeiði saman við børnunum uttan fyri heimið.

Foreldur kunnu leita sær námsfrøðiliga ráðgeving frá teimum, sum eru um børnini á kommunalum stovnum.

**Samskifti**

Kunning um tilboð til børn og ung skal vera lætt atkomiligt hjá øllum borgarum.

Kommunan eigur javnan at gera nøgdsemiskanningar fyri at meta um dygdina á sínum tilboðum til børn og ung og menna tey enn meira.



